Kunngerðablaðið A
2023
Givið út 3. juli 2023

Nr. 87 30. juni 2023

**Kunngerð**
**um**
**prístalsjavning av lestrarstuðli í tíðarskeiðinum 1. august 2023 til 1. august 2024**

Við heimild í § 19, stk. 2 í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 25. mai 2009, verður ásett:

**§ 1.** Prosentvísa broytingin í miðalprístalinum fyri undanfarna ár 2022 í mun til miðalprístalið fyri árið frammanundan 2021 er 7,7%.

**§ 2.** Studningurin til teirra, ið taka hægri lestur ella førleikagevandi útbúgving, er kr. 4.960 mánaðarliga, sbr. § 7, stk. 2 í løgtingslógini.
*Stk. 2.* Studningurin til teirra, ið lesa á miðnámi ella í fólkaskúla, er kr. 4.387 mánaðarliga, um tann lesandi er forsyrgjari ella kann skjalprógva útreiðslur av egnum bústaði, sbr. § 7, stk. 3 í løgtingslógini.
*Stk. 3.* Studningurin til teirra, ið ikki eru fevnd av § 7, stk. 2 ella 3 í løgtingslógini, og annars lúka treytirnar fyri at fáa lestrarstuðul, er kr. 2.113 mánaðarliga, sbr. § 7, stk. 4 í løgtingslógini.

**§ 3.** Lestrarlán sbrt. § 8 í løgtingslógini kann í mesta lagi vera kr. 2.782 um mánaðin.

**§ 4.** Bókastudningur sbrt. § 10 í løgtingslógini er kr. 4.186.

**§ 5.** Vistarhaldsstudningur sbrt. § 11 í løgtingslógini er kr. 2.925.

**§ 6.** Barnastudningurin sbrt. § 12, stk. 2 í løgtingslógini er mánaðarliga kr. 1.149 fyri hvørt barnið undir 18 ár.
*Stk. 2.* Studningurin til einsamallar uppihaldarar sbrt. § 12, stk. 4 í løgtinglógini er kr. 1.762 um mánaðin.

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. august 2023.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 30. juni 2023

**Djóni Nolsøe Joensen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)